## Harðdiskurin á veg í søguna

Skipanin við snarandi metalplátum til goymsu av data er á veg í søguna. Framleiðslan av Flash-harðdiskunum hevur tikið seg nógv fram seinnu árini, og nú verður roknað við, at ein Flash-harðdiskur í komandi ári kann keypast fyri á leið 1.500 kr. Flash-diskarnir nýta somu tøkni sum minniskortini til fartelefonir og myndatól, og bara í ár er prísurin á hesum lækkaður 57%.



## Bíligur batmobilur

Tað vakti ans, tá bilurin hjá Batman varð settur til sølu á uppboðssølu herfyri. Filmurin varð framleiddur í 1995, og við sínum 14 milliónum krónum á príslepanum var bilurin hjá Batman ein av teimum dýraru lutunum í filminum. Á uppboðssøluni kom hægsta boðið tó ikki hægri enn upp á hálva aðru millión, so sigast má, at keyparin fekk sær ein bíligan bil. Hvussu nógv bilurin fer at verða nýttur, er tó ein annar spurningur.

# Íblástur til virkisfús

**Nú Íverksetarahúsið skjótt hevur eitt ár á baki hevur virksemið prógvað, at brúk er fyri einum staði hjá virkisfúsum fólki at venda sær til, fyri at seta síni hugskot í verk. – Hetta hevur verið ein sukses, heldur leiðarin, Rani Nolsøe**

ÍVERKSETAN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað var á sumri í fjør, at Rani Nolsøe byrjaði at spæla sær við tankanum um at seta á stovn eitt íverksetarahús, og í samráði við Vinnulívsráðið og vinnulívsfólk í Klaksvík búnaðist hetta hugskot restina av árinum.

Hann skrivaði eina virkisætlan og vendi sær til Klaksvíkar kommunu, Landsstýrið og Eik Banka. Leiðslan í Eik og Klaksvíkar kommuna sóu beinanvegin møguleikan í hesum og góvu sín týdningarmikla stuðul. Tað eggjaði sjálvandi Rana at arbeiða víðari við málinum.

Fyrst í árinum var so tíðin komin, at bera verkætlanina fram fyri almenninginum, og 15. januar var fundur í Atlantis í Klaksvík, har verkætlanin varð løgd fram.

- Tað vísti seg, at áhugin var ógvuliga stórur. Atlantis var stúgvandi fult av fólki hetta kvøldið, sigur Rani Nolsøe.

Tað sigur seg sjálvt, at hetta eggjaði og skundaði undir Rana at fara undir hetta nýggja og spennandi tiltakið, og longu fáar dagar seinni – 21. januar – varð fyrsta skeiðið hildið.

Men tað er sjálvandi ikki bara at siga tað, at halda slíkt skeið, har krevst stór fyrireiking. Men hendan fyrireiking var longu fingin frá hondini, tí Rani Nolsøe hevði tryggjað sær eitt stórt netverk av ráðgevum og vinnulívsfólki, sum kunnu stuðla og vegleiða bæði nýggjum og verandi íverksetarum.

Talan er um eitt skeiðsnetverk, sum umfatar 22 ráðgevar frá einari rúgvu av vinnuøkjum, so sum televeitara, handilslívi, bankavirksemi, sniðgevaheiminum, PR-økinum og mongum fleiri.

### Væl nøgd

Hesi skeiðini hava verið ein sannur íblástur fyri tey luttakandi. Sum Rani sigur: ”Spyr ikki meg um vøruna eg framleiði, spyr tey sum keypa.” Og lat okkum so gera tað:

»Eitt ordiliga gott skeið, har eg veruliga fekk nógv praktiskt og brúkiligt burturúr. Eg havi fingið íblástur til víðari menning og nøkur týdningarmikil amboð, ið kunnu verða við til at heilstoypa og vaksa um mína fyritøku. Eg eri glað fyri, at eg fór, og havi eg av álvara fingið eitt spark til víðari menning, og fari eg at byrja beinanveg«, var metingin frá Barbaru, ið eigur Cre8.

Og Petur í Gong, stjóri og partaeigari í MP Teknik, gevur skeiðinum hetta skotsmál:

»Eitt sera áhugavert skeið, har ljós varð varpað á flestu avbjóðingar og trupulleikar, tú kemur út fyri sum íverksetari. Avgjørt eitt skeið, eg vil viðmæla. Haldi, at fyrilestrarhaldarin dugdi sera væl at taka dømi frá veruliga lívinum«.

Tað serliga áhugaverda við allari verkætlanini er, at meiningin er ikki bara at fáa fólk við einum hugskoti »sparkað« í gongd, men eisini er ætlanin, at tey, sum eru komin í gongd skulu hjálpast víðari, eins og tey longu etableraðu kunnu fáa íblástur at víðka um virksemið.

- Tað er ein tungur og langur vegur frá tí tú fært eitt hugskot, til tú ert komin í gongd við virkseminum. Tú skal hava fígging, men fyri at fáa tað, mást tú hava eina góða og seriøsa ætlan, fyri at fíggingarstovnarnir skulu verða áhugaðir. Tí hevur tað so ómetaliga nógv at siga, at tú kanst fáa hjálp til allar teir týdningarmiklu smálutirnar, ið skulu til, fyri at fólk skulu trúgva upp á verkætlanina, sigur Rani Nolsøe.



*Rani Nolsø starvast nú burturav sum leiðari av Íverksetarahúsinum*

### Egin grunnur

Fyrsta hálva árið røkti Rani Nolsøe starvið sum íverksetararáðgevi við síðuna av starvinum sum menningarstjóri hjá Klaksvíkar Kommunu. Men av tí at tiltakið fekk so góða undirtøku gjørdist tíðliga greitt, at hetta ikki kundi avgreiðast sum eitt »vinstrahonds arbeiði«.

Og 1. juli í ár varð so ein grunnur settur á stovn at reka Íverksetarahúsið. Í nevndina fyri grunnin vórðu Kitty May Ellefsen, stjóri í SMS, Eyðun Mørkøre, deildarleiðari í Eik og Torben Hendriksen, stjóri í Innovatorium í Herning, vald. Nevndin setti síðani Rana Nolsøe sum stjóra fyri Íverksetarahúsið.

Tað er Klaksvíkar Kommuna, sum setti Grunnin Íverksetarahúsið á stovn, og sum saman við Eik Banka og Vinnumálaráðið fíggjar virksemið. Alt hetta merkir, at Rani Nolsøe nú burtur av kann taka sær av at hjálpa ikki minst ungum fólki við einum góðum hugskoti at koma í gongd.

- Tankin er, at vit ikki skulu vera ein rúgva av fólki her í húsinum, við eini fylgjandi stórari umsiting, sum skulu senda íverksetarar gjøgnum eina øðrkymlandi myllu av bureaukrati, tvørturímóti skulu vit gera tað so lætt sum gjørligt at sleppa í gongd. Og tað gera vit við tí umfatandi netverki av ráðgevum, vit hava upparbeitt, sigur Rani Nolsøe.

Hann fegnast sjálvandi um teir stuðlar, sum standa aftan fyri verkætlanina, tí tað vísir jú, at kommuna og land eins væl og førandi bankin í landinum trúgva upp á verkætlanina. Og tað sigur seg sjálvt, at tað er altavgerandi fyri bæði hugin og áræðið at halda fram.

Og Íverksetarahúsið hevur eisini góð úrslit at vísa á hetta fyrsta knappa árið tað hevur virkað. Tað hava nevniliga verið 51 fólk á teimum fýra skeiðunum, Íverksetanarhúsið hevur skipað fyri, síðani byrjanina 21. januar í ár.

- Ja, eg haldi, at vit mugu kalla tað fyri eina sukse.

Hetta lítlað árið hava vit íhvørtfall fýra íverksetarar, sum eru heilt avgreiddir frá okkara síðu, vit hava átta, sum í løtuni leita eftir fígging, og heilar 26, sum hava fingið ítøkiliga hjálp at skriva virkisætlan. Haraftrat hava fimm fingið patentráðgeving, sigur Rani Nolsøe.

### Stórar ætlanir

Íverksetanarhúsið hevur sín heimstað í Klaksvík, men Rani Nolsøe leggur stóran dent á, at hetta er ein verkætlan, sum umfatar alt landið.

Tað er sjálvandi ikki brúk fyri fleiri íverksetanarhúsum í einum so lítlum landi sum Føroyum, og tað er bara reint fysiskt, at bústaðurin er í Klaksvík. Virkistíðin hevur verið stutt, minni enn eitt ár, men kortini hava vit havt viðskiftafólk úr øllum landinum, sigur Rani Nolsøe.

- Higartil hava tey áhugaðu fyri tað mesta verið úr Klaksvík, Eysturoy og Havnini, men vit hava tó havt skeiðsluttakarar úr øllum pørtum av landinum, sigur Rani Nolsøe.

Hann hevur nú arbeitt við hesum hugtakinum í eitt lítið ár, og tað hevur givið húsinum ikki bara royndir og spísskførleikar innan íverksetararáðgeving, men so sanniliga eisini íblástur til meiri komandi ár.

- Sum á so mongum øðrum økjum, so er eisini spurningurin um at fáa á fatur á íverksetarum á so ungum árum sum gjørligt. Tí liggur tað í okkara ætlanum at fáa íverksetan inn í fólkaskúlan eisini. Tað krevur sjálvandi, at lærararnir eru við upp á tað, men tað hevði verið mennandi at kunna stimbra hugin hjá næmingunum at gerast íverksetarar longu á heilt ungum árum, sigur Rani Nolsøe.

Hann heldur, at tað kundi verið gjørt gjøgnum spæl og ímyndaðum verkætlanum, har børnini fingu læru um, hvussu tú byrjar eina framleiðslu og hvussu tú marknaðarførir og selur hesa.

Men visiónin røkkur víðari enn til føroyska fólkaskúlan, hon umfatar eisini eitt norðurlendeskt samstarv, har føroyingar kunnu »útveksla« hugskot og royndir á økinum.

### Framtíðin

- Eg havi verið greiður yvir, at altjóða netverk eru neyðug, tá vit arbeiða við íverksetan. Vit fara í 2008 í eitt samstarv við Startup Company at menna allan skeiðspartin í Íverksetarahúsinum.

Eisini fara vit í samstarv við londini í Útnorðuri. Tí eru vit og NORA (NORA er eitt felagsheiti av Grønlandi, Íslandi, Føroyum og Norðurnoregi) nú á veg inn í eitt samstarv um at fáa útnorðurøkið samansjóðað í eitt innovativt samstarv, sigur Rani Nolsøe.

Tankin her er at kanna, hvørjar felags trupulleikar og felagsmál londini í NORA hava, og um vit ikki øll vinna í einum góðum samstarvi okkara millum. Fyrsta átakið verður helst ein felagsfundur einaferð í vár, sum skal haldast í Íverksetarahúsinum í Klaksvík millum Grønland, Ísland, Norðurnoreg og Íverkset-

